rebelskari tannáringagentu úr onkrum vánaligum b-filmi. Fyrstu dagarnar sat hon í isolatión og gekk runt í hondjørnum saman við maskulinu vaktunum.

Henrique og eg hava avgjørt, at mál okkara má vera at engagera tær gentur, ið gjarna vilja læra okkurt. Vit hava ongar royndir her og einki at skula liva upp til. Vit royna at greiða gentunum frá, at vit væl vita, hvussu lítið áhugavert tað kann vera at ganga í skúla, so her snýr tað seg bert um at hava tað stuttligt saman, meðan vit læra ymiskt nýtt og spennandi.

## Fríggjadagur 20. februar

Tímin í dag varð nakað nógv styttri enn vanligt. Í royki-steðginum hvarv Henrique knappliga eina løtu. Nakrar minuttir seinni kom hann aftur saman við einari av gentunum grátandi eftir sær. Hon gjørdi sær dælt av okkara manglandi vitan um fongslið við at royna at rýma við at renna út og klintra upp um stóra hegnið, ið er rundan um tjúkku fongsulsmúrarnar. Tíbetur sá Henrique hana gjøgnum vindeygað, júst sum hon fór rennandi eftir longu gongini hinumegin húsið og hann náddi at fáa hana aftur, áðrenn ov seint varð. Hóast hann sum ein gentlemaður lovaði henni ikki at siga vaktunum frá, tyktist einki at kunna steðga tárum hennara. Gentan bara græt og græt, meðan vinkonurnar royndu at ugga hana. Vit royndu hinvegin at byrja undirvísingina aftur, men Twisterspælið og øll tey smáu litkortini vórðu nú rættiliga lítið áhugaverd og at enda tímdu bestu vinkonurnar hjá gentunum enn ikki at hyggja upp á okkum.

Vaktirnar í fongslinum eru rættiliga sløvar og av og á gloyma tær at hyggja eftir gentunum, meðan vit hava undirvísing. Tær síggja okkum ístaðin sum tvey ung hjálparfólk, ið eru komin fyri at lætta um arbeiði teirra og at taka yvir leiklut teirra sum strangur vaktautoritetur.

## Leygardagur 28. februar

So kom síðsti dagur í februar sníkjandi og eg eri longu á veg víðari á ferð mínari. Tað kennst eins og eg júst eri komin til Argentina. Februarmánaðin, ið vanliga følist óendaliga langur heima í regni og vindi, er flogin framvið her í sólríka Argentina. Í gjár hevði eg síðsta arbeiðsdag í fongslinum og mánadagin fer leiðin aftur víðari norður til



oyðimørkina í Kili. Júst sum man heldur, at skil byrjar at koma á enskttímarnar saman við gentunum, skal man fara frá teimum aftur. Jaja, tað er nokk ov nógv ár at vóna, at alt bert fer at laga seg eftir so stuttari tíð saman við teimum. Genturnar hava jú í so nógv ár livað eitt hart gøtulív. Men hóast hetta hevur man vónir um, at man kann vera við til at broyta og bøta um lív teirra á onkran hátt. Her kemur Supermankenslan aftur fram. Ella kanska er tað ikki Supermankenslan, men bara kenslan um, at man á onkran hátt kann gera ein lítlan mun.

Eg var einsamøll við gentunum í gjár til at spæla spøl og vit hugnaðu okkum á síðsta degi mínum, men óróliga og órógvandi cuttingsgentan hevði aftur avbera ringt við at konsentrera seg. Hon gjørdi alt, hon kundi, fyri at gera vart við seg og fáa hinar at hyggja eftir sær. Aftur noyddist eg at steðga tímanum áðrenn tíðin var liðin og lova gentunum inn í lítlu sellurnar at halda siesta. Við eini kenslu av máttloysi fór eg sjálv at sortera øll mynda- og litkortini, sum vit høvdu arbeitt við seinastu vikurnar. Eg hugsaði, um tað var soleiðis, hjálpararbeiði átti at kennast; var tað soleiðis, at man endaði við eini kenslu av, at heimurin er so stórur, trupulleikarnir so øgiligir og man sjálvur bert kann gera ein so lítlan mun?

Júst sum eg soleiðis sat í døpurhuga, kom besti næmingurin í flokkinum yvir til mín. Hon hevur ongantíð passa inn ímillum allar hinar uppreistarsinnaðu tannáringagenturnar, ið búgva her saman við henni. Hon hevur gingið í skúla í nógv ár, dugir væl at lesa og skriva og hon kann enntá føra eina basala samrøðu á enskum. Hví hon er her í fongslinum hava Henrique og eg mangan undra okkum á.

- Eg vildi bara siga orsaka fyri, at tær uppføra seg soleiðis viðhvørt, tað er ikki tín feilur. Góða eydnu í Kili og Peru. Eg ivist ikki í, at tú fært eina góða ferð, smíltist hon. Eg gleddist um orð hennara; kanska er eitt lítið ljós hóast alt fyri endanum av langa tunnlinum?

Sosialurin